# TILTØK

## Gudstænastur 15. nov.

**Havnar kirkja:** Kl. 11
Sonja Klein.
**Hoyvík:** Kl. 11
Lestur.
**Nólsoy:** Kl. 12
Ann D. Hansen.
**Christianskirkjan:** kl. 11
Magnus Brahé Jørgensen.
**Tvøroyri:** kl. 11
Símun Jacobsen.
**Øravík:** kl. 12.15
Símun Jacobsen.
**Kvívíkar kirkja:** kl. 12
Theodor E.D. Olsen.
**Norðskála:** kl. 12
Emil Olsen, messa.
**Eiðis kirkja:**
Fríggjakvøldið kl. 20 verður sálmasangskvøld, har ymiskir sálmar verða sungnir. Endað verður við stuttum aftansangi (aftanbøn) og aftankvirru.
**Hellurnar:** kl. 12
Uni Næs, altarg.
**Funningsfjørður:** kl. 16
Uni Næs.
**Vágur:** kl. 11
Patrick de Neergaard, alterg.
**Sambýlið í Vági:** kl. 14
Patrick de Neergaard, alterg.
**Skála kirkja:** kl. 11
Henning Bøgesvang, dópur og altarg.
**Gásadalur:** kl. 11
David Johannesen, altarg.
**Æðuvík:** kl. 11
Martin R. Jacobsen.
**Hov:** kl. 12
Bjarni Bæk
**Viðareiði:** kl. 12
Elsa Funding, altarg.

## Adventkirkjan

Mikukvøldið kl. 19.30 bønarmøti hjá Agnieszku & Birgir Johannesen, Hoydalsvegur 32.
Hóskvøldið kl. 19.30 bønarmøti hjá Sonju & Jens V. Danielsen, Tildugøta 5.
Fríggjakvøldið kl. 19.30 bønarmøti hjá Torill & Bergi Jensen, Vípuvegur 12.

## Ítriv verður í skúlanum í Funningi

fríggjakvøldið 13. nov. frá kl. 19-22 og leygardagin 14. nov. frá kl. 10-14.
Øll eru vælkomin. Meiri fæst at vita á tlf. 417000.

## Fuglafjarðar kirkja

Týsdagin 10. nov.
kl. 19.30-21 Sálma- og sangkvøld.

## Leirvíkar kirkja

Mikudagin 11. nov.
kl.15.30. Gudstænasta fyri eldri í samstarvi við Heimatænastuna. Altargongd, Uni Næs. Drekkamunnur aftaná í missiónshúsinum.

## Fuglafjarðar kirkja

Hósdagin 12. nov.
kl. 15.30 Gudstænasta fyri eldri í samstarvi við Heimatænastuna. Altargongd, Uni Næs. Drekkamunnur aftaná í kirkjukjallaranum.

## Fýra sálmakvøld í Fuglafjarðar kirkju

Týskvøldið 10. nov. verður tað fyrsta av fýra sálmakvøldum í Fuglafjarðar kirkju. Tiltakið er fyri øll og sungnir verðar kendir og minni kendir sálmar í sálmabókini. Nú adventin nærkast, verða eisini adventssálmar sungnir og onkrir jólasálmar. Sálmakvøldini eru hvørt týskvøld kl. 19.30-21.

## »Samskifti í hjúnalagnum«

Hóskvøldið verður skipað fyri einum fyrilestri í kirkjukjallaranum í Christianskirkjuni fyri pør, har Gunhild Aaen Madsen, psykoterapeutur, fer at røða um evnið: "Samskifti í hjúnalagnum". Tað verður eisini høvi at seta spurningar, og ein góður drekkamuður verður eisini at fáa. Tiltakið er ókeypis og byrjað verður kl. 20. Øll eru vælkomin!

## Hebron á Argjum

Mikudag kl. 10 kvinnur biðja fyri børnunum. Kl. 20 Bíbliutími og bønarløta, Jón Helmsdal - Orðt. 4.
Sunnudag kl. 10.30 Morgunmøti. Kl. 11.30 samvera við drekka. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 12.15 møti - Jógvan Steintún talar. Kl. 20 Ungdómsbólkur fyri ung úr 8. flokki og eldri.
Mánadag Kl. 20.30 Kvinnuløta - Jóhanna Andreasen kemur at tosa um evnið "Mentalar forðingar".

## Frelsunarherurin Tórshavn

Týskvøldið kl. 20 Hornvenjing.
Mikudag kl. 15 Bønarløta. kl. 19 Cellu gruppa fyri kvinnur.
Hóskvøldið kl. 20 Heimaforbund fyri kvinnur. Kl. 20 Tey ungu samlast í høllini.
Sunnudag einki morgunmøti. Bøn kl. 17.30 og møti kl. 18. suppa, sápa og frelsa síðan 1865.

## Frelsunarherurin Vágur

Týsdagin kl. 09.30 orðið á borðið kl. 20 heimaforbundi.
Mikudagin kl. 14.30 barnakór.
Hósdagin kl. 20 streingjakóri øvar.
Til allir Suduringar:
Mikudagin 25. nov. kl. 19 verður árasøla, tikið verður ímóti lutum við tøkk.
Sama kvøld er ætlanin at hava loppumarkna so hava tit lutir, (ikki klæðir) tit ynskja at lata, eru tit vælkomin at ringja 588558 ella 764214 og vit heinta tað.

## KFUM og KFUK í Havn

Týsdagur kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn og juniorar.
Mikudagur kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið kemur saman.
Hósdagur kl. 20 í KFUK: Varðmenn hittast.
Mánadagur 16. nov. kl. 15 í KFUK: Seinnapartsamkoman við Ásu og Sigvald Kristiansen.
Týsdagur 17. nov. kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn og juniorar.
Mikudagur 18. nov. kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið kemur saman.
Hósdagur 19. nov. kl. 19.30 í KFUK: Bíbiltími við Biels Paula Danielsen presti. Evni: Jesaja kap. 6.
Leygardagur 21. nov. kl. 15 basarur í KFUK.
Mánadagur 23. nov. kl. 15 í KFUK: Seinnapartsamkoman við Kjartan Mørkøre presti.

## KFUM & K i Klaksvík

Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími við Leivur í Buð Jákupsbrævið kap.1

## Saron, Vestmanna

Týsdagin kl. 20 Bønarmøti í Saron.
Hósdagin kl. 18.30 barnaarbeiðið.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting.

## Kambsdalur, Handilsskúlin

Týskvøldið kl. 20 Bønar-og uppbyggingarmøti.

## Meinigheitshúsinum í Havn

Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími v/ Herluf Heinesen 1 Joh. 2, 18 -29
Mikukvøldið kl. 20 Felafskóri venur
Hósdagin kl. 16 Venur gentukóri
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Thomas Dam, evni. Hví mátti Jesus doyggja.
Leygardag kl. 13 Kvinnur í bøn. Í loftstovuni í Meinigheitshúsinum.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli
Sunnukvøld kl. 17 Møti v/ Jan við toymi. evni At møta menniskjum, har tey eru.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Meinigheitshúsið á Skála

Sjómanskvinnuringurin kemur saman mikukvøldið kl. 19.30, mint verður á jólapakkarnar, allar kvinnur vælkomnar.

## Missiónshúsinum við Landavegin

Hóskvøldið møti kl. 20
Sunnukvøldið møti kl. 18

## Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum

Týskvøldið kl. 18.30 In-between.
kl. 20 Argjakórið venur.
kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Hóskvøldið kl. 18.30 Barnakórið venur. kl. 20 Bíbliutími. Evni: Matt. 9, 1-17.
Sunnukvøldið kl. 18 Familjumøti.
Mánakvøldið kl. 20 Sjómanskvinnuringurin. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

## Missiónsvika í Hellunum 13.-15. november 2009

Fríggjakvøldið 13. nov. kl. 20 talar Andreas Andreasen og Glyvra streingjakór syngur
Leygarkvøldið 14. nov. kl. 20 talar Pól Johannesen og KFUM kórið syngur.
Sunnudagin 15. nov. kl. 12 er gudstænasta við Una Næs. Altargongd.
Sunnukvøldið 15. nov. kl. 18 talar Gunnar Reynslág og Argjakórið syngur. Innsavnan til Heimamissiónina. Drekka verður hvørt kvøld eftir møtini.
Øll eru hjartaliga vælkomin!

## Missiónshúsið á Tvøroyri

Týskvøldið kl. 20 verður bíbliutími og bønarløta.

## Miðvágs Missiónshús

Mikukvøldið kl. 18.30 Felags juniormøti fyri alla oynna.
Hóskvøldið kl. 20 Missiónsvika. Elisabeth Hvítklett úr Sørvági talar og Meinigheitskórið úr Havn syngur.
Fríggjakvøldið kl. 18 Felags nátturði. kl. 19:30 Sangmøti við luttøku av Kirstin & Terja, Noomi og Salve. Maja Jakobsen úr Havn talar.
Leygarkvøldið kl. 19.30 Missiónsvika. Jørgen Andreasen, Leirvík talar. Sangbólkurin "Ljós" syngur. Barnaansing. Innsavnan til missiónshúsið. Drekka aftaná. Kl. 22.30 ungdómsløta.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 Missiónsvika. Joan Simonsen av Saltangará talar. Lovinda Halgaklett syngur. Barnaansing. Innsavnan til heimamissiónina. Drekka aftaná. Hjartaliga vælkomin.

## Missiónshúsið, Vágur

Missiónsvikan byrjar hvørt kvøld hesa vikuna kl. 20.
Sunnudagin Seinasta møti í missiónsvikuni, kl 18.

## Missiónshúsið í Skopun

Mikudagin eingin bíbliutími vegna missiónsvikuna í Skálavík.

## Missiónshúsið í Rituvík

Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 19 Juniorringur.
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudag kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti.

## Missiónshúsið í Skálavík

missiónsvika verður í døgunum 11. til 15. nov.
Øll eru vælkomin.

## Kollafjarðar Missiónshús

Týskvøldið kl. 20 bíbiltími.
Hóskvøldið kl. 19.30 bønarløta.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Vestmanna Missiónshús 80 ár

Í samband við, at missiónshúsið í Vestmanna verður 80 ár 10. nov. verður sangmøti leygardagin kl. 20 og føðingardagsborðhald sunnudagin kl. 18. Øll eru vælkomin.
Sunnudagin kl. 18 verður møti í missiónshúsinum við Irenu og Tummas Jacobsen úr Hvalvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Keldan, Skálafirði

Leygarkvøldið kl. 21 Awake.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj. Sangur við Sølvu Ford.Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

## Ebenezer

Týsdag kl. 17 Frítíðararbeiði. Kl. 20 Sangvenjing-Sangkórið.
Mikudag kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti
Hósdag kl. 12.30 Andakt. Kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Kl. 12 Sunnudagsskúli. kl. 18 Evangeliskt møti
Mánadag kl. 20 Kvinnumøti
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

## Filadelfia, *Landavegur 22*

Týsdagin Kl. 16 Bøn fyri samkomuni
Mikudagin Kl. 16.30 Bøn fyri Ísrael og býnum. Kl. 18 Delli, børn 3.- 6.fl. Kl. 20 Chill
Hósdagin Kl. 20 Bíbliutími við Pætur Bærentsen, evni: krops-teologi
Leygardagin Kl. 21 Felags ungdómsmøti
Sunnudagin Kl. 11 Morgunmøti v/sunnudagsskúla. (Hánd i handske) Tummas Jacobsen talar.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin
www.filadelfia.fo

## Filadelfia Vágar

Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli. Dánial á Dul Jacobsen talar.
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Fríkirkjan Oasan

*Kirkjustræt*
Hósdagin kl. 17.30 Hip-Hop og Balet, kl. 20 Ungdómsmøtið.
Fríggjakvøldið kl. 20 After8,
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Símin Jacobsen, kl. 12 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 16.15-17. Barnakórið kl. 17-18. Ungdómskórið, kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

## Lívsins Orð fyri vikuna

Týsdagin kl. 17.30 Liljur
Mikukvøldið kl. 19.30 Bønarmøti. Kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

## Getsemane, Stangaskákið 1

Týskvøldið kl. 19.30 er bíbliutími.
Hóskvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti.
Leygarmorgun kl. 10 er morgunbøn.
Sunnukvøldið kl. 18 er møti.
Barnamøti er samstundis. Hvønn gerandismorgun kl. 06.15 er morgunbøn.

## Soli Deo Gloria

mikukvøldið kl. 19.30 bønarbólkur dreingir.
hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti v/ Bodil Simonsen.
sunnukvøldið kl. 18 møti v/ kvinnubønarbólkinum.
Tú ert hjartaliga vælkomin.

## Samkoman Immanuel,

*Brekkutún 5, Hoyvík*
Mikukvøldið kl. 20 Møti
Hósdagin kl. 10 Kvinnuhugni, hesuferð hittast vit heima hjá Jórun Malaikev, Norðari Ringvegur. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar
Fríggjakvøldið kl.19 Kongsins Herlið, børn 8-12 ár. Kl. 21 Herur Jákups, ungdómsmøti
Leygarkvøldið kl. 20 Møti v/ Gus O`haran úr Íslandi.
Sunnudagin kl. 11.30 Barnakórið venur. Kl 12; Møti v/ Gus O`haran úr Íslandi
Kl. 19 Enskt møti v/ Gus o´haran úr Íslandi.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.immanuel.fo

## Tórshavnar Hvítusunnusamkoman *Yviri við Strond*

Hvønn sunnudag kl. 18 er Evangelisk møti "Ein nýggj byrjan". Øll eru vælkomin.
Møti verður leygarkvøldið 14. nov. kl. 20 í Bygdahúsinum í Haldarsvík. Vitnisburður og sangur. Øll eru vælkomin.

## Tilhaldið Hugnin í Sandoy

*hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

## Tilhaldið í Tórsgøtu

tlf: 316491/286491
Teldupostur:tilhald@torshavn.fo
Tilhaldið í Tórsgøtu, tlf: 316491/286491
Teldupostur:tilhald@torshavn.fo
Opið er mánadag til fríggjadag kl. 9-17.
Týsdagur
Kl. 15 Prát. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mikudagur
Kl. 9 Maskinbinding, Marita Guttesen.
Kl. 9 Veving, Joana Bjarnastein.
Kl. 9 Bindiklubburin. Fyrireiking til jólasøluna.
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 10 -13.30 Matgerð, Bjørk Hendriksen. Nøkur pláss eru. Tilmelding: 316491.
Kl. 15 Fimleikur, Dánjal Húsgarð.
Kl. 15 Túrur: Hamarin á Argjum. Øll eru hjartaliga vælkomin. Elisabeth og Randi, fysioterapeutar.
Hósdagur
9-11.15 Bólkur 1, Óroynd, Tekstviðgerð grundskeið, Páll Poulsen. Nýta word og ymsar goymslur.
Kl. 11.45-14 Bólkur 2, Roynd, Tekstviðgerð víðkað skeið, Páll Poulsen. Talvur í word.
Kl. 14.15-16.30 Bólkur 3, Samskifta á alnótini, Páll Poulsen. Gera postkassa og nýta hann.
Kl. 10 Fimleikur, Greta Ellingsgaard.
Kl. 11 Lesibólkurin: Vit lesa: "Endurminningar" Heðin Brú. Hittast 26. nov. Vit halda til á bókasavninum. Øll áhugaði eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 14-15 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Fríggjadagur
Kl. 9-17 Bindiklubbur.
Kl. 10-13.30 Magerð, Bjørk Hendriksen. Nøkur pláss eru. Tilmelding: 316491.
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin. Opið hús. Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

## Pensionistafelagið í Havn

Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Telefon: 22 27 33
E-mail: finnurj@post.olivant.fo

## Eldrafelagið Kumlá á Skála

hevur hugnakvøld týskvøldið kl. 19 við luttøku av Herborg Joensen úr Lorvík, sum sigur frá um upplivingar, tá hon var í Grønlandi.

## Eldrafelagið Nón

Opið hús mánadag til fríggjadag kl. 14.30-17.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Dagtilhaldið í Fuglafirði

Vit eru flutt, og møtast nú í Lonini, mánadag, týsdag (ítriv v/Rigmor), og mikudag, kl. 15-18. Eisini verður teldulæra. Ring til Jóhan Hera, tlf. 737810.
Øll eldri eru vælkomin.

## Dagtilhaldið í Nólsoy

er opið mána- týs- og hósdag frá kl. 13 til 17.

## Dagtilhaldið Blákollan á Oyri

Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.